Núpur er sum eitt nýtt skip

- Tey fyrstu árini var tungt at reka skipið, tí vit høvdu nærmast fiskaloysi, men síðan 1996 hevur tað gingið ógvuliga væl. Seinastu árini hevur Núpur fiskað fyri einar 14-15 milj. krónur um árið, sigur reiðarin, Erling Petersen

Núpur er eitt ógvuliga gott skip í sjónum. - Seinastu seks árini, hevur skipið neyvan ligið bakk meira enn ein hálvan dag, sigur reiðarin, Erling Petersen

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Mikumorgunin kom línuskipið, Núpur, aftur á Klaksvík eftir at hava verið á bedingini, Karlsson Marine í Hirtshals, síðan hálvan mai. Hetta er sama beding, sum nútímansgjørdi línuskipið, Pison, í fjør.

Reiðarin, Erling Petersen, sigur, at nútímansgeringin av Núpi varð sett til 12 vikur, og hesa tíðarfreist megnaði bedingin væl at halda.

Hann sigur, at reiðarríið er væl nøgt við arbeiði, sum gjørt er í Hirtshals.

Hirtshals kommuna fylgir væl við, hvat vinnulívið í býnum fæst við. Toskurin á skipssíðuni er ein gáva frá kommununi og ferðavinnuráðnum í býnum

Betraðar umstøður

Nútímansgeringin av Núpi hevur kostað felagnum, sum eigur skipið, P/F SJG, stívliga 4 milj. krónur.

- Endamálið við øllum, ið gjørt er, er at gera manningarumstøðurnar betur. Alt framskipið er broytt. Áður hevði skipið hvalabak, men bakkin er nú lagdur út og er bygdur beint upp. Sama er við dekkinum undir bakkanum, sum ikki longur skráar uppeftir.

Reiðarin sigur, at hesar broytingar gera framskipið, har øll manningin heldur til, nógv rúmligari.

- Áður vóru 20-22 koyggjur har frammi, tí skipið í sínari tíð var á saltfiski. Nú eru 11 koyggjupláss undir bakkanum í eitt og tvey-manskømrum. Manningin hevur fingið nýtt uppihaldsrúm, umklæðingarrúm og nýggj brúsurúm. Somuleiðis eru goymslurúmini undir bakkanum rúmligari.

Erling sigur, at har afturi í skipinum eru kømrini hjá yvirmonnunum, skipara, stýrimanni, meistara og kokki.

- Hesin parturin av skipinum varð nútímansgjørdur í 1986 og er í góðum standi. Hann vísir á, at í 1986, tá ið Joensen & Olsen áttu skipið undir navninum, Jógvan S, fekk skipið nýggjan motor.

- Eldur kom í skipið, og tá vórðu rúmini har afturi gjørd av nýggjum.

Gott arbeiðsdekk

Arbeiðsdekkið á Núpi er eisini nýtt, og her hevur í minstu smálutir verið hugsað um manningina.

- Fiskurin kemur úr línurennuni og fer síðan á sliskur og bond, soleiðis at alt, ið gjørt verður, er í manshædd. Ongum manni nýtist longur at bukka seg niður eftir fiskinum, og tí gongur arbeiðið, sum fer fram á dekkinum, ikki á sama hátt útyvir ryggin sum áður.

Reiðarin sigur, at í 1999 varð skipið sandblást, bæði innan og uttan.

- Alt stálið er sandblást og metaliserað og sær nærum eins væl út í dag, sum tá ið skipið kom úr Skagen í 1999.

Erling sigur, at í ár 2000 fekk Núpur eisini stabiliseringstanga, sum er bygdur frammanfyri stýrhúsið. Tað var Tórshavnar Skipasmiðja, sum gjørdi hetta arbeiðið.

- Skipið er ikki at kenna aftur; tað er ógvuliga gott í sjónum og kann fiska í øllum veðri.

Reiðarin sigur, at í seks ár hevur Núpur neyvan ligið bakk meira enn ein hálvan dag.

- Góði stabiliteturin ger, at skipið ikki hivar í línuna alla tíðina, hóast vánaligt veður er, sigur Erling.

Hann vísir á, at hugsað hevur eisini verið um trygdina hjá manningini.

- Nú Núpur hevur verið í Hirtshals, er nýtt rekkvert eisini gjørt omandeks afturi á skipinum, har boyur og standarar verða kastaðar í havið. Heila rekkverkið, sum er umleið ein metur høgt, ger tað tryggari og heitari hjá manningini at standa á bátadekkinum.

Gingið ógvuliga væl

Í 1992 keypti partafelagið, SJG, sum stendur fyri Stig, Jóannes og Gunnar, Núp, og seinni kom so Erling upp í felagið.

Erling er virkandi reiðari og stjóri í felagnum, sum bara eigur Núp.

- Tey fyrstu árini var tungt at reka skipið, tí vit høvdu nærmast fiskaloysi, men síðan 1996 hevur tað gingið ógvuliga væl.

Reiðarin sigur, at tá ið Núpur varð keyptur, varð mett, at hann skuldi fiskað fyri einar 5-6 milj. krónur fyri at bera seg, men seinastu árini hevur skipið fiskað fyri 14-15 milj. krónur um árið.

- Í ár hevur eisini gingið rættiliga væl, og áðrenn skipið fór niður til Danmarkar í mai, vóru manningarnir undan helst teir bestu nakrantíð, sigur Erling Petersen, reiðari.

Skipari á Núpi er Birgir Poulsen úr Hvannasundi, og stýrimaður er Jóannes Vágsgarð, sum býr í Klaksvík.

Núpur, fyrrverandi Jógvan S, er bygdur í fimtiárunum og lastar 1300 kassar av ísfiski.

Fara í gongd aftur í Saltangará

- Trupult er vanliga at fáa handverkarar um summarið, men vit vóru hepnir í so máta og hava fingið tað gjørt, sum vit stílaðu fram ímóti, sigur Jason Johannesen

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Eitt av virkjunum hjá Føroya Fiskavirking, sum hevur ligið stilt vegna summarfrí, er virkið í Saltangará. Har føru tey í summarfrí beint fyri ólavsøku, og ætlandi fer fólkið aftur til arbeiðis mánadagin komandi.

Neyðugar ábøtur

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at leiðslan avgjørdi at leggja stilt í tríggjar vikur, tí ymiskar ábøtur skuldu gerast.

- Vit hava eitt nú skift tríggjar hurðar út á frystarínum. Neyðugt var at skifta hesar út nú. Síðan hava málarar og elektrikarar snøggað um og framt ymiskar ábøtur á instalatiónirnar.

Jason sigur, at hóast verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum var drúgt, so vísir tað seg kortini, at fólk vilja hava frí nakrar vikur mitt um summarið.

- Fyri tveimum árum síðan avgjørdu vit ikki at leggja stilt, tí vit høvdu havt verkfall, men tað vísti seg, at tá ið summarið kom, fóru nógv arbeiðsfólk í summarfrí kortini.

Hann sigur, at hesaferð var ikki so nógv at tosa um, tí neyðugt var at gera ábøtur.

Hepnir

- Trupult er vanliga at fáa handverkarar um summarið, men vit vóru hepnir í so máta og hava fingið alt gjørt, sum vit stílaðu fram ímóti, sigur Jason Johannesen.

Gongst sum ætlað, verður fiskaarbeiðið aftur á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Saltangará mánadagin.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Mathilda Abrahamsen 65 ár

– nøkur minnisbrot

Leygardagin 16. august verður Mathilda systir sekstifimm ár. Borin í heim í Toftum í Fuglafirði, har mamma og pápi búðu eini tvey ár, áðrenn tey festu búgv Norðuri á Bakka. Mamma var úr Oyndarfirði – dóttir Daniel Jacob Anthoniussen, bátasmið og Lenu Anthoniussen, húsmóðir. Abbi var úr Ansastovu og omma var úr Tarti. Faðir var úr Toftum í Fuglafirði, sonur Jóhannu Mariu og Thomas Johan Johannesen. Omma var ættað úr Toftum og abbi var av Hellunum. Hetta er ein partur av uppruna okkara.

Seks ár eru millum okkum bæði. Í barnaárunum er hetta nógv, men tá ið komið er upp í vaksnamannaliðið, er javnvág komin í. Tá eru t.d. barnaárini ein felgas ogn, sum ikki er merkt av ein um ávísum ársmuni.

Tá ið leitað verður aftur í tíðina, er henda tíð runnin avstað í einum umhvørvi, sum var merkt av fjálgum løtum Norðuri í Bú, sum hetta stað eisini verður rópt. Mamma var altíð við hús og faðir sigldi. Skipini lógu við Stórubrúgv, kaiina ella lógu fyri teym á vágni. Hetta var okkara barnaverð, ein skaldaheimur við anga úr New Foundlandi, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Hvíta havinum, Norðsjónum og Bretlandi. Koksið, Stórhús, Kolhjallarin og Stórabrúgv var ein rás út í heim. Her komu stórir damparar í okkara eygum og skipaðu farm upp – salt, kol, stykkjagóðs og lastaðu klippfisk. Á Luftbrúnnið vóru skinnarar, har lunnavagnar fóru út og inn við salti og koli. Hetta var ein sera framkomin máti, tá ið lossað og landað varð; sum fáastaðni í okkara litla landi. Hetta hava eygu tíni sæð, og vart tú mangan við í hesum roka, tá ið t.d. fiskurin skuldi turkast í Turkihúsinum, ella tá ið gula flaggið hjá Pidda fór upp á sumrið: Nú skuldi fiskurin breiðast út á fiskastykkinum hjá Gamla Sámal Peturi. Ikki so sjáldan hevði tú ein treiskan beiggja í knæsbótunum við tær. Tað skal tú hava tøkk fyri, at tú hevði umsorgan fyri mær, og ikki lat meg ganga fyri vág og vind. Hetta var ein lætti hjá móðir, sum tíðliga kendi bága av giktini.

Frá fyrsta degi av vísti tú títt hegni at vera sera arbeiðsøm og sera dugnalig til hendurnar, lærdi væl í skúlanum og ágrýtin. Mangt plaggið virkaði tú upp á mín kropp. Øll árini, meðan eg gekk í skúla í Havnini, varð mangt bakilsi sent suður og stungið í skjáttina, tá ið farið var suðuraftur til høvuðsstaðin. Onkuntíð verður sitið í kurvastólinum í sissheimi við eini feitari seruttt, meðan hugsað verður um hesar dagar.

Tú spældi hondbólt – stóð í málinum á liðnum hjá ÍF. Serliga minnist meg dystirnar, sum tit høvdu ímóti Stjørnuni. Dystirnir vóru spældir á kaiøkinum, áðrenn fótbóltsvøllurin varð tikin í nýtslu. Her varð eisini sparkað og væl bar til. Ein dyst minnist meg serliga væl, sum var spældur í ringasta áarføri. Tómar sildatunnur stóðu á kaiini. Vit dreingir vóru aldri ráðaleysir, tá ið umstøðurnar ikki vóru eftir okkara høvdi. Fóru niður í hesar tunnur, løgdu lok omanyvir og settu tær dygst við línuna, ið var um vøllin, og hugdu eftir dystinum út ígjøgnum spungslið. At siggja ein heilan dyst út ígjøgnum eitt so lítið hol, var ein kykmynd, sum rennur fram fyri ein, tá ið sitið verður í kurvastólinum. So knávar tit vóru, og so stinn tú vart í málinum. Nei, tað kann næstan ikki sigast frá hesum. Tit vunnu, og hóast klaksvíksgentur vóru eitt sindur rísnar eftir dystin, so var var lagið gott, tá ið Emanuel, Polaris ella Barkur løgdu aftur frá landi. John Reid Bjartalíð stóð frammi á bógnum og helt lítla talu, rópti hurrá, og øll skóru úti at syngja: Land mítt, har grasið í líðum grør. Herluf Berthelsen segði nøkur orð á kaikantinum, rópti hurrá , og vit á landi tóku dyggiliga undir við sanginum. Genturnar úr Klaksvík høvdu fingið ein góðan drekkamunn heima við hús, áðrenn farið varð inn aftur til Klaksvíkar, so nú var skúlvurin á teimum ein annar. Hetta var ein góður ítróttarandi, ið ofta verður róð afturá, og hevur sett seg í hugan frá eini tíð, har alt var meiri fólkaligt.

Eina tíð arbeiddi tú í Tip-Top. Her var stílur í hjá gamla Dora. Hvítur kittil og hvítur kappi um hárið prýddi teg. Hvít frá høvur til føt. Hugsi tit vóru eini fýra fimm, ið arbeiddu í hesum tignaðarliga bakarii. Um hetta mundi vóru tvey bakarí í bygdini – hitt var Krossbúðin. Ikki skulu dagar takast ímillum, hvar breyð og køkur smakkaðu betur, men Napoleonskøkurnar í Tip-Top sóust ikki so sjáldan á borðinum á Bakkanum, og smakkaðu tær stak væl. Eitt annað, sum var forkunnugt, tað var, tá ið skiltið var sett í gluggan: Ísur í dag. Tá hevði ísmaskinan verið í sving um morgunin, og nú ráddi um at vera í fremstu røð við fimmti oyrum, so tú fekst smakkin av hesum leskiliga summarlystimetinum. Hetta var í eini tíð, har mangt og mikið varð virkað úr næstan ongum, og mundi tógvið vera mangan at fáa alt at bera til, so ísur úr Tip-Top frøddi barnasinnið. Ísurin var ikki at forsmáa, og serligan tokka hevði tú til henda ís, tí tað var systir tín, ið hevði flýggjað tær hann, og ikki sørt errin vart tú av hesum. Ja, ja,... »Ísur í dag!«

Øll á Bakkanum vóru í sama báti. Fedrarnir vóru sjómenn og burtur størsta partin av árinum. Í sluppitíðini lógu skipini fyri teym um veturin, men í trolaratíðini var siglt alt árið. Tá vóru bara gomul fólk, ommur og børn á Bakkanum. Mangan, tá ið so var, lá leiðin norður um Fuglafjarðarboðar til Oyndarfjarðar, ella gingið varð um Skarðið. Móti jólum 1941, greiddi mamma frá, at tú vart borin í einum leypi, um Skarðið. Minnis meg rætt, var tað Tummas Løkstein á Hellunum, sum hevði teg á rygginum í leypinum. Hetta rann mær til hugs næstsíðsta sunnudag, tá ið Helena hjá Ansgari hevði eina so frálíka talu uppi á Skarðinum, har hon tók nøkunlunda soleiðis til orðanna: Skarðið, hegnið var markið millum tað, sum er og var. Hetta var so frálíka væl sagt, at flyta seg úr einum hagaparti í ein annan og so síggja tað, at ein onnur verð rann upp fyri einum. Hvussu tú sum trý ára gomul hevur sæð henda ævintýrheim út ímillum rimarnar á torvleypinum hjá faðir og móðir, minnist tú kanska ikki, men tað sum vit minnast, er hvussu væl vit vóru havd av ommu og abba í Ansastovu, og hvussu mangan vit hava sitið væl inni á Skorpisheyggi og inni hjá mammubeiggja. Ofta var tað so, at tú hevði umsorgan fyri einum smádreingi, sum var so balstýrin, at hann næstan ikki var at flættast við... men eg má aftur siga, at tað skalt tú hava takk fyri. Jú Skarðið var markið millum tað sum var, og tað sum er.

Ævintýrið í Oyndarfirði var markleyst. Minnist tú á einum sinni vit hjálptu Elsu og Olivinu í Húsi við hoyggingini? »Stelirnar ikki, sum tit eru røsk! Komið til hús við Elsu og Olivinu. Okkurt eigur Elsa, at geva. Ja, lukka, Elsa er ikki sør, Elsa veit okkurt.« Vit fóru um ánna við skaptu gomlu konunum, sum høvdu miklan skaldskap í sær av einum barokkanda, sum tú vart drigin at. Ikki settu tær stór krøv til tilveruna, men fingu tær mettuna, sum ikki var óvanlig hugsan manna millum, so var tað miðaldarliga sinni tamt av inntonktum dagsmálum.

Elsa fór inn í høsnarhúsið og kom út aftur við fýra eggum – tvey í part. »Ja, lukka, vælsignað, egg eigur Elsa, Elsa eigur at geva, Elsa er ikki sør. Heilsa ommu tykkara í Ansastovu, hon er móðir Guðs á jørð. Ja, stelirnar ikki, lukka!« Ja, hetta var lønin at vera dagleigari hjá Olivinu og Elsu í Húsi ein dag fyrt í fimmti árunum. Eg meini tað, hetta var annað bedatt!

Á Fuglafjørð komu nógvir norskir sildabátar. Teir kundu gott liggja her í nakrar dagar og tá var... dans på brygga. Harmonikudansur í Dansistovuni. Eini tvey summur upp í slag (53-54?) lá Andenes (ein norsk korvett) her og reinsaði ketil í einar 14 dagar. Hugsi, hetta skip var hjálparskip hjá teimum norsku sildabátunum, sum vóru á sild norðan fyri Føroyar. Sumrini vóru so sera góð, so dansað varð næstan hvørt kvøld.

Fleiri fótbóltsdystir vóru millum manningina og ÍF á kaiøkinum. Tá ið bólturin fór á sjógvin, lupu hesir brasnu marinarar á bláman eftir bóltinum. Hesir knarkar vuksu í okkara eygum, so smidligir teir vóru í vatninum.

Minnist tú Mathilda sjeikarnar? Var hann ikki reyðhærdur, sum tú dansaði við? Spæliorkestur var umborð, so hetta setti ein serligan dám á hesar dagar í dansistovuni. Onkur yrkti ein sang um skipið, tá ið tað var farið. Tá stóðu genturnar eftir á Sandinum og hugdu út á tann bláa fjørð við langtandi eygum. Meg minnist bara 1. ørindi:

Nú Andenes er farin,
so keðiligt tað er,
og Tetis er komin ístaðin,
men tað kanska sama ger.

Ein ungur lærari av Strondum kom inn í myndina í 1954. Arnold var komin til Fuglafjarðar 1953 sum lærari. Tit blivu skotin hvørt í øðrum og giftust 1958. Veturin 1955/56 var tú á Vejle husholdningsskole, meðan Arnold var á Lærarahaskúlanum. Hetta var tíðin, at genturnar skuldu búgva seg út til at vera dugnaligar húsmøður, og hugsi eg, at tú fekst væl á skaftið hetta árið, tí matgera hevur tú verið óføri til, og undirvíst hevur tú fleiri ár í Fuglafjarðarskúla og í kvøldskúlanum.

Tú og Arnold hava bygt eitt gott heim uppi í Fløtugerðinum, og ikki kann annað sigast, at børnini eru væl undan komin og ommu og abbabørnini eru so stak fitt. Lagnan er so ymisk, men danir plaga at taka til: Andin sigrar á likaminum, tá ið holdið rennur dyst við lagnuna. Hóast giktin er farin um teg, hevur tú við tínum vilja, áræði og stremban lagt árar út og bart ímóti sjúkuni. Tú ert okkum øðrum eitt gott fyridømi, men eg má leggja afturat, at Arnold hevur verið tær ein góður stuðul øll hesi ár í hesi gongd, og hetta er fyrimyndarligt.

Ja, sekstifimm ár eru farin í tíðarinnar hav. Hetta er ikki smávegis, og havi eg bara nomið við okkurt hissini, sum rann mær til hugs í kurvastólinum, nú tú rundar hesi ár. Okkurt annað kundi verið nomið við, men hetta bleiv so tað. Hjartaliga til lukku við sekstifimm ára degnum.

Frits

Christian Reinert Petersen 70 ár

12. august fylti Christian Reinert Petersen í Havn 70 ár. Christian er føddur og uppvaksin í Saltnesi, sonur Ninnu, f. Reinert, úr Kaldbak, og Dávur Petersen úr Saltnesi.

Christian byrjaði at læra til jarnsmið hjá Hans M. Reinert í Havn og gjørdi seg lidnan við hesa útbúgving í Danmark.

Hann sigldi eina tíð, áðrenn hann fór á maskinskúla í Havn og fekk útbúgving sum maskinmeistari. Eftir tað sigldi hann sum maskinmeistari við føroyskum línuskipum.

Fyrst í 70-unum keypti hann skipasmiðjuna í Vestmanna saman við John Smith og Jesmari Hansen. Teir bygdu t.d. teir sergjørdu línubátarnar Stapan og Thomas Nygaard, ið vóru sera framkomnir tá í tíðini.

Christian sigldi sum maskinmeistari við sjúkrabátinum Reyðakrossi í nógv ár og var seinni sum maskinmaður á Landssjúkrahúsinum, til hann fór frá fyri aldur fyri trimum árum síðan.

Annars hevur hann í nógv ár sungið við í Tórshavnar Manskóri og Kristiliga Sangkórinum, hann er enn við í báðum kórunum.

Christian hevur sera gott handalag, hann ger ymiskar prýðislutir úr stáli og sagar trælutir við leyvusag. Hann er vanliga við á framsýningum við hesum prýðislutum.

Dagurin

15. august. Mariumessa. Hildin til minnis um himmalsferð Mariu. Dagurin varð eisini róptur *mariumessa í hoyna.* Tendringin um hetta mundið eitur *í hoyna.*

Jákup Jakobsen doyði hendan dagin í 1918.